# handVERKARIN

2011 | BLAÐ NR. 40 | HAVNAR HANDVERKARAFELAG




LÆRURÁÐIÐ
Í FØROYUM

váttar, at ár 1963 26 oktober gjørdi
Bjørnvarður í Dali
føddur í Tórshavn 4 december 1944.

SVEINASTYKKI

sum tør- og varmasmiðjur og var tað
varmaverk

Sveinaroyndarnevndin hevur eftirkannað og góðtikið sveinastykkið. við rós

Føroya Læruráð

Tórshavn, 26 oktober 1963

Formaður

# Gleðilig jól og eitt gott nýggjár

Nú 2011 er farið at halla vil eg níta høvið at ynskja limum okkara við familju eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi komandi ár. Samstundis ynski eg øllum okkara samstarvsfeløgum eini gleðilig jól og tøkk fyri gott samstarv í brátt farna ári.

## Skrivstovan

Gjørt verður vart við, at skrivstovan er stongd frá og við 23. desember. Opið verður aftur týsdagin 3. januar 2012 kl.09.00

***Eli Brimsvík, formaður***

**Í blaðnum hesa ferð:** **síða**


Gleðilig jól . . . . 2
Lønartalva 1. oktober 2011 nr. 63 . . . . 3
Bjarnvarður í Dali: Handverkari og golffjeppari. . . . . 4
Sjónarhornið: Jóhann Eli Jacobsen . . . . 18
Lívstrygging . . . . 20
Stásilig hølir til ymsik endamál . . . . 28
Tímaløn, frítíðarløn, gjøld v.m.. . . . . 29



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media · **Umbróting, prent og liðugtgerð:** Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Skrivstovutíð:** Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo · www.handverk.fo

# LØNARTALVA 1. OKTOBER 2011 NR. 63

**Tímaløn handverkarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Longri útbúgvingar | | kr 125,13 |
| Styttri útbúgvingar | | kr 120,07 |

**Yvirtíðarlønir:**

| | | |
|---|---|---|
| Fyrstu 4 tímarnar | + 35% | kr 168,93 |
| Næstu 3 tímarnar | + 60% | kr 200,21 |
| Fylgjandi tímar | + 100% | kr 250,26 |
| Leygar-, sunnu- og halgidagar | + 100% | kr 250,26 |

1. mai er heilur frídagur. Flaggdagur,
grundlógardagur,
1. nov., jólaaftan eru frídagar aftaná
kl. 12.00 og arbeiði í mattíð + 100% kr 250,26

**Viðbøtur: + hesi % av handverkaralønini**

| | | |
|---|---|---|
| Amboðspeningur | 0,83% | kr 1,04 |
| Skitiarbeiðspeningur | 0,41% | kr 0,51 |
| Bergholsarbeiði | 8,28% | kr 10,36 |
| Dampketilsarbeiði | 8,28% | kr 10,36 |
| Olju-og lýsitangaarbeiði og arbeiði í smáum tangum | 8,28% | kr 10,36 |
| Olju-og lýsitangaarbeiði og arbeiði | 8,28% | kr 10,36 |

Vanliga arbeiðsvikan er 40 tímar

**Bakarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 04-07 | + kr 65 | 190,13 |
| Kl. 04-07 vikuskifti | + kr 100 | 225,13 |

**Servisufak:**

| | | |
|---|---|---|
| Leygardag kl. 08 - 14 | + 35% | 168,93 |
| aftaná kl. 14 | + 100% | 250,26 |

**Skiftisarbeiði:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. bólkur | | 125,13 |
| 2. bólkur | 6,63% | 133,43 |
| 3. bólkur | 9,11% | 136,53 |

| | | |
|---|---|---|
| **Serarbeiðarar: (við útbúgving)** | | 116,92 |
| **Serarbeiðarar: (uttan útbúgving)** | | |
| 1. árið | | 111,98 |
| 2. árið | 1,45% | 113,60 |
| 3. árið | 2,92% | 115,25 |
| 4. árið | 4,41% | 116,92 |

**Starvstíðarviðbót**

Fyri 3 ára starvstíð 1,60%

**LÆRLINGALØNIR**

| | Um tíman | Um vikuna |
|---|---|---|
| 1. árið 32% | 40,04 | 1.601,60 |
| 2. árið 40% | 50,05 | 2.002,00 |
| 3. árið 45% | 56,31 | 2.252,40 |
| 4. árið 55% | 68,82 | 2.752,80 |
| 5. árið 70% | 87,59 | 3.503,60 |

Pensiónsgrunnur (lærlingar): 7,50%

Fyri yvirarbeiði verður øll læruárini goldið
serarbeið.løn á 1. ári 111,98 + hesi %

| | | |
|---|---|---|
| Fyrstu 4 tímarnar | + 35% | 151,17 |
| Næstu 3 tímarnar | + 60% | 179,17 |
| Fylgjandi tímar | + 100% | 223,96 |

**Leygardag:**

| | | |
|---|---|---|
| Fyrstu 5 tímarnar | + 35% | 151,17 |
| Fylgjandi tímar | + 60% | 179,17 |
| Sunnu- og halgidagar: | + 100% | 223,96 |

**Lærlingaviðbøtur fyri forskotna tíð**

Bakaralærlingar
Allar dagar kl. 18.00 - 04.00 kr. 35,00
Sunnu- og halgidagar kl. 00.00 - 24.00
og frídagar kr. 25,00
Kokka- og tænaralærlingar
Gerandisdagar kl. 18.00 - 06.00 kr. 4,00
Leygar-, sunnu- og halgidagar kr. 5,50
Frisørlærlingar
Sunnudagar verða goldnir eins og yvirtíð hjá lærlingum

**ANNAÐ**

Gjøld sbrt. sáttmála:
VITAN (Eftirútbúgvingargr.) 2X10oyru/tím.
Pensiónsgrunnur 13,00%

**Lógarásett gjøld**

| | |
|---|---|
| Samhaldsfasti | 1,75% |
| ALS gjald frá 01.07.2004 | 1,00% |
| Barsilsskipan | 0,65% |
| Frítíðarløn | 12% |

Føroya Arbeiðsgevarafelag/
Føroya Handverksmeistarafelag
tlf./fax 30 99 00 / 30 99 01

Landsfelag Handverkaranna
tlf./fax 35 48 00 / 35 48 01 / 234809

# BJARNVARÐUR Í DALI: HAND

So at siga hvønn gerandismorgun leita golfhugaðir havnarmenn út á Glyvursnes at spæla golf. Ein teirra er Bjarnvarður í Dali.

Hjá okkum, sum ikki hava skil fyri golfítróttini, tykjast umstøðurnar á golfvøllinum á Glyvursnesi at vera primitivar í mun til tað, sum vit kenna frá øðrum londum. Men tað hevur ongan týdning fyri Bjarnvarð, hann greiðir okkum frá, at tað, sum hevur størstan týdning fyri hann er at koma út í náttúruna, fáa fríska luft og lív í kroppin – tað er balsam fyri sálina, leggur hann afturat. Men golfvøllin á Glyvursnesi mugu vit ikki "forsmáa", tað hava vit mangan hoyrt frá útlendingum, sum hava roynt vøllin. Útlendingarnir eru ofta bergtiknir av náttúruni, sum vøllurin er gróðursettur í, greiðir Bjarnvarður frá.



*Per Poulsen, Vilhelm Andreasen, Eyðun av Reyni og Bjarnvarður í Dali*

Ætlanin við hesi grein var ikki at fordjúpa okkum í golfítróttini, men heldur at varpa ljós á ein handverkara, sum júst hevur rokkið eftirlønaraldur; 4. desember 2011 gjørdist Bjarnvarður 67 ára gamal.

## Ikki bara Havnarmaður

Onkur hevur helst hug at siga, at Bjarnvarður er havnarmaður við stóra H. Men tað tekur hann ikki undir við, mamman var úr Kvívík, og hann greiðir frá, at har var hann nógv sum smádrongur, og kennir seg tí ikki bara sum havnarmann. Hóast hann hevur nógv góð minni úr Kvívík, so hevur hann kortini altíð búð í Havn.

Tá Bjarnvarður fór í skúla í 1951 var bert ein almennur barnaskúli í Havn, skúlin húsaðist í vakra grótbygninginum í miðbýnum, sum partur av umsitingini hjá Tórshavnar kommunu í dag húsast í.

## Guli Kommunuskúli

Í fimmtiárunum vaks barnatalið í Havn nógv, og skjótt gjørdist trongligt í gamla Grótskúlanum í Miðbýnum. Tí varð farið undir at byggja nýggjan skúla longur uppi í býnum, tað er skúlin sum í dag verður nevndur Guli Kommunuskúli.

Ætlanin var, at nýggi skúlin skuldi standa liðugur – í góðari tíð – eftir summarfrítíðina í 1956. Men arbeiði gjørdist drúgvari enn ætlað, og tí fingu børnini – hetta árið – eina

munandi longri summarfrítíð enn vanligt. Skúlin stóð liðugur um hálvan september 1956, og tá fóru øll skúlabørnini í Havn við gleði í ein nýmótans skúla, sum mætastu listafólkini í Havn høvdu prýtt.

Tvey ár seinni var fólkaskúlin hjá Bjarnvarði fingin frá hondini, og nú leitaði hugurin sær eftir einum læruplássi; hann hevði sett sær fyri at fáa eina handverksútbúgving.

## Í handverkslæru

Bjarnvarður minnist, sum var tað í dag, at Hans Martin Reinert hevði eina lýsing í Dimmalætting, har hann boðaði frá, at hann hevði pláss til ein VVS-lærling.

Tað mest vanliga, tá sum nú var, at foreldrini royndu at finna eitt læruupláss, men Bjarnvarður var so altráur, at hann fór sjálvur beina kós niðan til Hans Martin, og søkti um læruplássið og tað eydnaðist.

Seinni fortaldi Hans Martin, at hann hevði fingið nógvar umsóknir frá foreldrum, men av tí, at Bjarnvarður var tann einasti, sum sjálvur kom at tosa við seg, fall valið á hann.

Hans Martin búði tá við Hoyvíksvegin, og hevði verkstað í kjallaranum.




*6 a í Tórshavnar kommunuskúla í 1958. Ovasta rað frá vinstru: Andrias í Lon, Andor Sundar Hansen, Sverri Viderø, Karl Johansen, Hjalmar Petersen, Johannes Samuelsen, Marni Ørvarodd. Rað nr. 2 frá vinstru: Marianna Reinert, Eydna Joensen, Anna Joensen, Lussi Justinusen, Jónvør Johannesen, Katrin Dam, Sonja Hansen. Fremst frá vinstru: Jørgen Rubeksen, Regin Árting og Bjarnvarður í Dali.*

Bjarnvarður hevur alt gott at bera Hans Martin, hann dugdi væl at umgangast fólk, og hevði altíð umsorgan við lærlingunum. Bjarnvarður nevnir m.a. hvussu hann legði teimum eina við at standa rætt, tá teir lyftu, at teir skuldu fara niður í knøini, og ikki lata ov nógv standa á rygginum.

Hann fylgdi eisini væl við, hvussu arbeiðið var frágingið, og rósti teimum, tá hann metti, at teir høvdu rós uppiborið.

## Nøkur orð um Hans Martin Reinert

Bjarnvarður greiður frá, at hann minnist, at Hans Martin Reinert fortaldi, at hann var einans 14 ára gamal, tá hann fór til Danmarkar at læra til handverkara. Hann lærdi til tað, sum teir tá kallaðu "grovsmið".

Hans Martin var føddur í 1915, so hann er helst fluttur til Danmarkar umleið 1929.

Hann var so mikið leingi í Danmark, at hann bleiv innkallaður til hertænastu. Eftir lokna hertænastu arbeiddi hann í fleiri ár sum sveinur í Danmark.

Men undir øðrum heimsbardaga gjørdist hann kongaligur „gardi", og stóð tá mangan vakt uttanfyri Amaliuborg.

Tá var Christian „tíggjundi" danskur kongur, og kongshúsið búði, tá sum nú, fyri tað mesta á Amaliuborg í Keypmannahavn.

## Ein ógvuslig hending

Bjarnvarður minnist, at Hans Martin einaferð segði frá eini hending, sum fór fram, tá hann var á vakt við Amaliuborg undir seinna heimsbardaga.



*Hans Martin Reinert rak í sekstiárunum eina av størstu VVS-fyritøkunum í Føroyum. Hans Martin var føddur í Kaldbak í 1915*

Hann fortaldi, at tíðliga um morgunin 9. apríl 1940 sveimaðu týsk flogfør yvir Keypmannahavn.

Og brádliga lupu týskir herðmenn á teir, sum vóru á vakt við Amaliuborg. Til alla lukku var ongin dripin, men tríggir vóru særdir. Hans Martin duldi ikki fyri, hvussu bangin hann var ta løtuna.

Sjálvandi fræltist tað um hesa hending, tá ið Hans Martin kom aftur til Føroya eftir seinna heimsbardaga. Tí hoyrdi hann eisini onkuntíð, at havnarmenn nevndu hann "Hans Majested". Hetta tók hann sær kortini ikki tykni av.

Hans Martin Reinert andaðist í 1984.

Framhald á s. 8




Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútsgerð
Køligass

*Upplatingartíðir :*
mána, -friggjadag
8:00 - 17:00
Tlf, 315544
e-mail: Gassola@gassola.fo

**www.gassola.fo**

### Lærutíðin

Bjarnvarður fortelur, at fyrsti arbeiðsdagurin hjá Hans Martin var 17. desember 1958. Tá avráddi hann við Hans Martin, at læran skuldi byrja 1. januar 1959 og, at lærusáttmálin skuldi galda til 1. januar 1964.

Tá var vanliga lærutíðin hjá einum handverkslærlingi 4 ár, men samstundis var ein regla sum segði, at ein nýútbúgvin handverkari skuldi vera í minsta lagi 19 ára gamal. Av



*Húsini hjá Hans Martin við Hoyvíksvegin í Havn, har hann hevði VVS-verkstað í kjallaranum*

tí, at Bjarnvarður var so ungur, tá læran byrjaði (14 ár), mátti hann bíða til hann var vorðin 19 ár; tá var hann fult útbúgvin handverkari.

Hann minnist, at lærlingalønin 1. árið var 21,35 kr. um vikuna, tað svaraði til 10% av sveinalønini. Vit kunnu leggja afturat, at tá var arbeiðsvikan 48 tímar.

Mesta arbeiðið hjá Hans Martin í sekstiárunum var at leggja miðstøðuhita í nýggj eins og eldri hús um stóran part av landinum, men serliga í Havn. Tað var um hetta mundið, at føroyingar so smátt fóru frá at brenna torv, kol og koks til oljufýring.

### Sveinastykkið

Á heysti 1963 skuldi Bjarnvarður gera sveinastykkið, hann fekk at vita, at hann skuldi leggja miðstøðuhita í eini hús uppi í Hoyvík, stutt omanfyri núverandi Studentaskúla í Hoydølum.

Har skuldi hann seta ketil, oljufýr og radiatorar upp, og gera alt rørarbeiðið.

Sambært sveinabrævinum váttar Læruráðið, at hann gjørdi sveinastykkið 26. oktober 1963 sum rør- og varmasmiðjur. Í sveinabrævinum er orðið "varmaverk" skoytt uppí handverksheitið. Møguliga svarar hetta heitið til føroyska orðið miðstøðuhiti.

### Sveinabrævið

Í brævinum stendur eisini, at Sveinaroyndarnevndin hevur eftirkannað og góðtikið sveinastykkið við "rós". Sveinabrævið er dagfest 26. oktober 1963, og undirskrivað av Rikard Long.

Sýnsmenn vóru Eiler Jørgensen og Helgi Lervig.

Hóast sveinabrævið er dagfest 26. oktober 1963, so var lærutíðin ikki av fyrr enn 1. januar 1964. Her kunnu vit skoyta uppí, at tá tað stendur, at hann gjørdi sveinastykkið 26. oktober 1963, so man hetta helst vera dagurin, tá sýnsmennirnir hava sýnt sveinastykkið.

### Fyrstu royndirnar sum sveinur

Bjarnvarður arbeiddi sum sveinur hjá Hans Martin Reinert í umleið 1½ ár eftir, at hann var avlærdur.

# VERKARI OG GOLFFJEPPARI

Eftir hetta fór hann í starv hjá Wenzel Petersen. Tá var arbeiðið at gera stóra bygningin á Landssjúkrahúsinum boðið út. Wenzel Petersen fekk VVS arbeiði at gera. Tað arbeiði vísti seg kortini at hava lítið við handverk at gera. Tí valdi hann, at fara aftur til Hans Martin at arbeiða.

## Nýggj vinnugrein

Í 1971 tók Bjarnvarður stig til eina nýggja vinnugrein í Føroyum. Hann valdi at nevna hana oljufýrstænasta.

Í lýsing í bløðunum boðaði hann frá, at hann var byrjaður við hesi nýggju tænastuni. Í tí lág, at fólk, sum fingu trupulleikar við miðstøðuhita kundu boða honum frá umvegis telefon frá tíðliga á morgni til seint á kvøldið, 7 dagar um vikuna.


LÆRURÁÐIÐ
Í FØROYUM
SVEINASTYKKI

*Sveinabrævið er dagfest 26. oktober 1963*

Um hetta mundið høvdu so at siga øll húskið í Havnini fingið sær miðstovuhita og oljufýring. Men ongin hevði higartil bjóða seg fram at hjálpa fólki við viðlíkahaldi av oljufýringini, og veita akutta hjálp um oljufýringin steðgaði. Øll vita, at steðgar oljufýringin so sita fólk skjótt køld við ongum heitum vatni í krananum.

## Óljufýrtænastan

Tá Bjarnvarður byrjaði sína oljufýrtænastu keypti hann sær ein bil, sum hann gjørdi út við allari útgerð, sum var neyðug fyri at hava eina trygga tænastu. Her var sjálvandi talan um amboð, men eisini um eykalutir.

Fólk kundu tekna eitt árshald, sum gjørdi, at oljufýringin bleiv kannað einaferð um árið, og um neyðugt umvæld.

Var okkurt áfatt við oljufýringini kundu fólk ringja, og hann var so skjótast gjørligt á staðnum, og fekk oljufýringina at koyra aftur.

Í fyrstani vísti tað seg, at í fleiri førum var orsøkin til, at oljufýringin var steðga tann, at ongin olja var í oljutanganum. Fyri at tryggja sær, at allir trupulleikar kundu loysast skjótt hevði hann altíð nakrar dunkar við olju í arbeiðsbilinum. Tá var skjótt og lætt at loysa trupulleikan um kundin manglaði olju.

## Shell gerst kappingarneyti

Nakað eftir, at Bjarnvarður var byrjaður frætti hann, at Shell, sum tá var einasti kappingar-

neytin hjá Esso, hevði sent tveir mans á oljufýrskeið í Danmark, og ætlaði at byrja eina oljufýrtænastu, sum skuldi kappast við tænastuna hjá Bjarnvarði.

Bjarnvarður fór tí inn á gólvið hjá Esso, har Jákup Kass var stjóri, og greiddi honum frá ætlanunum hjá Shell.

Jákup Kass tók sera væl ímóti honum, og við eitt var alt leyst og liðugt.

Tá gjørdi Bjarnvarður eina avtalu við Esso, sum í høvuðsheitum var at:

1) Kundin skuldi tekna seg til eitt árshald hjá Esso. Bjarnvarður minnist, at fyrsta árið kostaði eitt slíkt hald 135,- kr. um árið.

2) Kundarnir, sum høvdu trupulleikar skuldu framvegis ringja til Bjarnvarð.

3) Var ein oljufýring gingin fyri so skuldi Esso altíð hava eina á goymslu so, at Bjarnvarður altíð skjótt kundi skifta eina gamla oljufýring um við eina nýggja.

Tá Esso seldi oljufýringar gav tað sjálvandi Esso eina nýggja inntøku.

Bjarnvarður leggur her afturat, at hann langt frá altíð skifti eina gamla oljufýring um við eina nýggja. Og avtalan við Esso setti stór krøv til hansara, tí nú var hann noyddur at seta fleiri fólk í starv, og keypa fleiri serútgjørdar arbeiðsbilar.

## Krevjandi arbeiði

Men arbeiði hjá Bjarnvarði var krevjandi og bundisligt. Kundarnir skuldu framvegis ringja til hansara, og tað kravdi stórt sæð, at hann var tøkur frá kl. 8 á morgni til kl. 23 um kvøldið.

Tað merkir ikki, at sjálvt arbeiði altíð kravdi so nógv. Í ávísum førum var orsøkin til trupulleikan hjá kundanum t.d. at ongin olja var eftir í oljutanganum. Tá var lætt at loysa trupulleikan. Hinvegin kom tað t.d. fyri, at



*Bjarnvarður hevði eitt skifti tríggjar vørubilar, sum vóru gjørdir út til oljufýrtænastu*

*Framhald á s. 15*




## MINKA UM ORKUNÝTSLUNA Í BÚSTAÐNUM

# ORKULÁN

## Vit veita fígging til orkusparandi tiltøk í sethúsum og íbúðum

Eigur tú hús ella íbúð, sum tú ætlar at endurnýggja ella umbyggja, er møguleiki at fáa lán frá Húsalánsgrunninum, um tiltakið er orkusparandi.

Húsalánsgrunnurin veitir fígging til m.a. bjálving, nýggj vindeygu, nýggjan húsaklædning, nýtt tak, hitaskipan.

Vilt tú hava meira at vita um orkulán frá Húsalánsgrunninum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

Ring ella støkk inn á gólvið Yviri við Strond, Tórshavn.

**Húsalánsgrunnurin**
Yviri við Strond 6 · 100 Tórshavn
Telefon 314583 · www.husalansgrunnurin.fo

ANNIJANNI

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

rør-tænastan
v/EYÐFINN HANSEN TLF. 22 81 80
Vatn•Hiti•Sanitet•Ventilatión

Ein depil innan skipatænastur

www.mest.fo

At smíðja, umvæla og umbyggja skip og verksmiðjur er okkara avbjóðing.

Men **MEST** er eisini so nógv annað.

**Vit bjóða m.a.**

- Serkøn fólk og vælútgjørdar smiðjur
- Landsins størstu goymslu av eykalutum
- Projekt- og teknistovuarbeiði
- Stórar bedingar og turrdokk
- Leigu av sleipibátum og kranum
- Titringsmátingar (vibratiónsanalysur)






MEST

**MEST**
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@mest.fo
www.mest.fo

Húsavarðartænastan
10 ár
2001 - 2011



# Ogna tær tín egna húsavørð

*- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð*

sansir.fo

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.

*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í samband við bygging og umbygging av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum.*

*Harafturat alla gólválegging: trægólv, teppi, linoleum og vinyl - eisini til vát- og baðirúm.*

## Reinsa við turr-ísi



NÝTT

Reinsar blámusopp, maskinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

## Betong-saging



NÝTT

Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.

**Húsavarðartænastan Spf**
Brattalíð 8 | Tórshavn
hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29

Húsavarðartænastan

# KETILIN

## ...NÝTIST AT SIGA MEIRA?

JÄSPI-ketilin er kendur í Føroyum. Við mest seldum ketlum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

JÄSPI-ketilin fáa tygum hjá Mariu Poulsen.

Ring 312000 og fá eitt óbindandi tilboð!



JÄSPI®

Maria Poulsen

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo

oljufýringin var ov gomul og skuldi skiftast. Tá var talan um størri arbeiði, sum t.d. skuldi gerast uttanfyri vanliga arbeiðstíð; tað kundi eisini vera í einum vikuskifti.

Við tíðini bleiv hetta arbeiði ov umfatandi og vaktirnar ov nógvar. Tí tók Bjarnvarður í 1982 avgerð um at royna aðrar leiðir.

## Wenzel Petersen, DEMICH og HITI

Um hetta mundið søkti Wenzel Petersen eftir einum manni í sambandi við, at teir høvdu fingið VVS arbeiði, tá nýggja Hotel Føroyar skuldi byggjast við Oyggjarvegin.

Tá farið var undir hetta arbeiðið varð Bjarnvarður settur at skipa fyri hesum arbeiði. Arbeiði á Hotel Føroyum stóð uppá í tvey ár.

Eftir at arbeiði á Hotel Føroyum var liðugt arbeiddi Bjarnvarður í 10 ár sum verkførari hjá DEMICH.

Í 1995 fór Bjarnvarður at arbeiða við nýggjari tøkni, tá tað snýr seg um VVS.

Tað var hjá fyritøkuni HITI, sum hevði handil í Stoffalág, men sum nú er vorðin partur av Balslev í Hoyvík. Her fekk hann m.a. høvi at arbeiða við hitapumpum, sólfangarum, og aðrari nútímans tøkni.

Skulu vit taka saman um yrkisliga partin hjá Bjarnvarði kunnu vit siga, at tá hann byrjaði at læra hjá Hans Martin 1. januar 1959 gjørdist tað meira og meira vanligt, at fólk sjálvi fingu sær ein brenniovn til at hita heitt vatn í til radiatorar. Seinni komu so ketlar, sum brendu olju og høvdu oljufýring.

Og seinnu árini, tá hann arbeiddi hjá HITA tók sølan av hitapumpum og sólfangarum seg upp. Hetta arbeiði dámdi honum stak væl.

## Frítíðarítriv

Eitt av mongu álitisstørvunum, sum Bjarnvarður hevur røkt í síni frítíð er formansstarvið í nevnd Havnar Bóltfelags. Hann var formaður í HB árini 1987-88.

Tá vit spyrja um hetta tíðarskeiðið greiðir hann frá, at hann hevði ongan hug at taka hesa uppgávuna uppá seg – hann visti, at tað stóð illa til fíggjarliga hjá felagnum. Og tað taldi eisini við, at hann ongantíð hevur verið tann stóri fótbóltsfjepparin. Men tá hann fekk fleiri áheitanir hugsaði hann seg væl um, og boðaði at enda frá, at um teir hildu hann vera skikkaðan, so vildi hann royna eitt ár.

Tá hann hevði tikið uppgávuna uppá seg vísti tað seg, at tað stóð nógv verri til fíggjarliga enn hann hevði roknað við. Tá sá hann, at uppgávan var ikki loyst eftir einum ári, og játtaði tí at taka tvær setur.

Tað stóð so illa til, at meginparturin av arbeiðinum hjá honum hevði lítið ella einki við fótbólt at gera. Tað snúði seg meira um at gera avtalur við kreditorar og royna at fáa inntøkur so skuldin kundi gjaldast niður.

Bjarnvarður greiður okkum frá, at eitt tiltak, sum fekk alstóran fíggjarligan týdning fyri HB var, at felagsskapurin HB-stuðlar varð endurstovnaður. Vit kunnu helst siga, at var hesin felagsskapurin ikki virkin hetta tíðaskeiðið, so hevði HB verið illa fyri í nógv ár.

Bjarnvarður kom skjótt eftir, at tað ráddi um, at fáa álitismenn í nevndina í HB-stuðl-

# BJARNVARÐUR Í DALI: HAND

um, og tað eydnaðist. Teir, ið tá komu í nevndina vóru Jógvan á Lag, Heri Mohr og Anfinnur Zakariasen.

Teir dugdu sera væl at skipa fyri og tí fekk felagsskapurin HB-stuðlar skjótt eitt heilt stórt limatal. Teir tríggir løgdu eitt sera stórt arbeiði fyri dagin, sum gjørdi at HB kom fyri seg aftur fíggjarliga. Tí gekk tað eisini væl at fáa rímiligar avtalur við kreditorar. Tað eiga teir tríggir Jógvan, Heri og Anfinnur stórt rós fyri.



*Frá vinstru: Bjarnvarður, Dinna (mamman) við Tummasi og Halgeir*

Á ítróttarliga økinum gekk tað eisini væl hjá HB í 1988; besta liðið gjørdist føroyameistari, og fleiri onnur lið hjá felagnum kláraðu seg eisini sera væl.

Tí var hetta ein góð og stuttlig tíð hjá HB, leggur Bjarnvarður afturat.



*Tvíburðarnir Eyðdis og Eyðvør*

Lat okkum her eisini nevna, at hann hevur eisini verið virkin í flogbólti, og seinastu árini hevur hann verið livandi partur av Tórshavnar Golfklubba. Er veðrið ikki vánaligt, so leitar hann sær – saman við fleiri øðrum – út á Glyvursnes at spæla golf – einar tveir/tríggjar tímar. Nú hann er farin frá við eftirløn liggur væl fyri at leika golf á Glyvursnesi fyrra partin á degi.

# VERKARI OG GOLFFJEPPARI

## Eftirløn og lívstrygging felagsins

Sum nevnt, tá vit byrjaðu hesa grein gjørdist Bjarnvarður 67 ára gamal 4. desember 2011, og fór tá um vanligan eftirlønaraldur. Enn hevur hann ikki frætt, hvussu stórt mánaðarliga eftirlønargjaldið verður úr Eftirlønargrunni felagsins.

Men til jóla fær hann tær fyrstu 85.000,- kr., sum verða goldnar av lívstrygging felagsins, tá limir gerast 67 ár.

Bjarnvarður og Betti eiga trý børn: Tvillingar, sum eru gentur, og Bogi, sum er elstur.



*Bjarnvarður og Betti giftust 7. desember 1968*


Málarameistari
RANSIN N. DJURHUUS
TEL. 26 46 82

# SJÓNARHORNIÐ: JÓHANN




**Núverandi starv:**
Arbeiði sum bilsmiðjur hjá Ivan Bilar

**Aldur:**
23 ár

**Unnusta:**
Dís í Dali Jespersen

**Børn:**
Unnustan

**Heiti á handverksútbúgving tíni:**
Bilsmiðjur

**Nær byrjaði tú at læra:**
19. August 2007

**Hvar gekk tú í Tekniskum skúla og hvørjar lærarar minnist tú:**
Tekniska Skúla í Tórshavn, bildeildin.

**Lærarar:**
Eirikur, Páll, Bergur, Beinir og Jón Heðin.

**Hvussu nógvar vikur gekk tú í skúla:**
Fyrsta skeiðið var 20 vikur. So vóru 7 skeið, sum vóru 5 vikur hvørt.

**Nær varð tú útlærdur:**
19. august 2011.

**Hvat fevndi títt sveinastykkið um:**
Vit høvdu ein dag við skrivligum uppgávum, og tveir dagar á verkstaðnum. Á verkstaðnum var ein partur har eg skuldi leita efir feilum í einum bilmotori. Seinna dagin skuldi eg kanna ein bil, sum hevði koyrt útav; har

# ELI JACOBSEN

skuldi eg kanna undirvognin. Tá skuldi eg kanna svingarmar, róðurgreyðir v.m.

**Hvar hevur tú arbeitt sum sveinur:**
Hjá Ivan Bilum.

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:**
Eg kann nevna ein XSARA-Picasso, sum skuldi skifta kedustrammara millum knastakslarnar; sum var sera ringur at starta. Hetta kom kortini alt uppá pláss, tá ein tíð varð fráliðin riggaði alt fínt.
Hvussu eitur besti handverkarin, sum tú veit um: Um tað ikki eri eg sjálvur, so havi eg ikki møtt honum enn.

**Frítíðarítriv:**
Arbeiða uppá bátamotorar, og renovera bilarnar „verforeldrunum“

**Besta bók:**
Eg elski allar „Haynes Repair Manual“ (royn bara at Googl'a).

**Besti sangur:**
Tað má vera okkurt lag hjá „AC/DC“, t.d. Razor's, Edge ella onkur hjá Hanus G. Johansen.

**Besti filmur:**
Man on fire.

**Besti sjónleikari:**
Mark Wahlberg.

**Hvør heldur tú hevur myndað tín persón mest:**
Foreldrini.

**Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:**
Jóhan Árnastein

**Hvør er tín størsta fyrimynd:**
Paul Watson (ha ha ha koyr á bláman)

**Fartelefon:**
HTC Legend.

**Telda:**
MSI

**Bilur:**
Havi tríggjar: Citroen ZX, Mazda E2200 og ein Golf Cabriolet frá 1979.

**Hvat heldur tú um eftirlønarskipanina hjá Havnar Handverkarafelag?**
Super.

**Hvat heldur tú um samlagstryggingina hjá felagnum?**
Ikki so galið, um man kemur lort í býin.

**Hvat heldur tú er størsta avbjóðingin hjá einum handverkara í dag?**
Innan fyri biløki man tað vera at tøknin broytist so skjótt.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum?**
At arbeiði gongur sum tað skal, og fólk rundan um meg hava tað gott.

**Hvat kann øsa teg?**
Órudd, órudd og aftur órudd.

greipan@hotmail.com

# LÍVSTRYGGING LIMANA

## Hvør er fevndur av tryggingini ?

Tú er fevndur av tryggingini, um tú er undir 67 ár og er limur í: Havnar Handverkarafelag Vágs Handverkarafelag Skála Handverkarafelag Føroya Prentarafelag ella Tvøroyrar Handverkarafelag

## Nær er tryggingin galdandi?

Tryggingin er galdandi um tú hevur óskerdan arbeiðsførleika, tá tú fær limaskap í felagnum. Ella frá tí degi tú aftur hevur óskerdan arbeiðsførleika.

## Nær er tryggingin ikki galdandi?

Tryggingin er ikki galdandi frá tí degi tú sigur upp tín limaskap ella verður strikaður sum limur.

## Tryggingarupphæddir:

Tryggingin fevnir um hesar upphæddir:

| | |
|---|---|
| Ávísar hættisligar sjúkur | kr 79.448,- |
| Barnatrygging | kr 79.448,- |
| Við deyða | kr 317.585,- |
| Lokalupphædd | kr 85.000,- |

## Ávísar hættisligar sjúkur

Tryggingin er galdandi um limur, áðrenn hann gerst 67 ár, fær ávísar hættisligar sjúkur:

Illkynjaða krabbameinssjúku
Blóðtøpp í hjartanum
Hjartaloku skurðviðgerð
Heilabløðing/blóðtøpp í heilanum
AIDS
Nýrasvignan
Disseminerað sklerosa
Miss av sjónini
Miss av hoyrnini
Parkinsons sjúka
Flutningur av stórum lívgøgnum (hjarta, hjarta/lunga, lunga og livur)
Ballónvíðkan av kranslívæðrum í hjartanum
Creutzfeldt-Jacob sjúka
Bjølgar á lívæðrum í heilanum
Ávísir góðkynjaðir vøkstir í heila ella mønu
By-pass skurðviðgerð (koronarsklerose)
ALS (amyotrofisk lateralsklerose)
Vøddasvinn
HIV-ígerð (av blóðflutningi ella orsakað av arbeiði)
Meningitis (frá 1/1-2009)
Aorta sjúka (frá 1/1-2009)
Eftir útgjald fevnir tryggingin ikki um nevndu hættisligu sjúkur.

## Barnatrygging – hættisligar sjúkur

Tryggingin er galdandi um so er, at barn, sum er millum 6 mánaðir og 18 ár, hjá limi fær staðfest eina av niðanfyri nevndu hættisligum sjúkum:

Meningitis
Krabbameinssjúku
Nýrasvignan
HIV-ígerð, av blóðflutningi
AIDS
Miss av sjónini (barn skal vera 2 ár)
Miss av hoyrnini (barn skal vera 2 ár)
Tá tryggingarupphædd er goldin, fellur tryggingin av viðkomandi barni burtur.

*framhald á s. 22*

# 2x3 er altíð eina vitjan verd

# 2X3

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN







Tórshavn 31 12 50 • Kambsdalur 44 44 41

# LÍVSTRYGGING LIMANA

Hesi børn hjá limum eru fevnd av tryggingini: Biologisk børn, Ættleidd børn Fosturbørn (sama fólkayvirlitsbústað sum limurin).

## Undantak frá reglunum um hættisligar sjúkur og barnatrygging í sambandi við hættisligar sjúkur

Um ein limur/barn, áðrenn upptøku í tryggingarskipanini, hevur fingið staðfest hættisliga sjúku, er viðkomandi sjúka og møguligar seinni samsvarandi sjúkur ikki fevndar av tryggingini. Ein áður staðfest hættislig sjúka kann eisini merkja, at ein ella fleiri aðrar sjúkur ikki koma undir tryggingina.

## Serregla viðvíkjandi krabbameini:

Um limur/barn áður hevur fingið staðfest krabbameinssjúku, er ein møgulig seinni staðfest krabbameinssjúka ikki fevnd av tryggingini, uttan mun til hvat slag av krabbameinssjúku talan er um. Tó er skipanin tann, at um tað eru liðin minst 7 ár síðani viðgerðin er endað, uttan nakað afturfall ella krabbasjúkuviðgerð, so er ein nýggj krabbameinssjúka fevnd av tryggingini.

## Útgjald við deyða

Doyr limur áðrenn hann er 67 ár, verður tryggingarupphæddin útgoldin.

## Lokaupphædd

Tá limur verður 67 ár fær hann goldið lokaupphædd um hann hevur verið limur í áður nevndu feløgum í minsta lagi í 10 ár. Í minsta lagi 5 av teimum 10 árunum skulu vera samanhangandi áðrenn limur røkkur 67 ára aldur.

## Hvør fær tryggingarupphæddina útgoldna?

Um limur ikki hevur sent Alka skjal serliga njótanartilskilan, verður tryggingarupphæddin í samband við deyða útgoldin til næstu avvarðandi.

Hetta merkir, at tryggingarupphæddin verður goldin tí/teimum, ið sita eftir í hesi nevndu raðfylgju:

1. hjúnafelaga/skrásettum partnara, og annars.
2. sambúgva, annars.

## Treytir:

a) Antin at tú og sambúgvi hava felags bústað, og vænta, hava, ella hava átt barn saman.
b) Ella at tú og sambúgvi tín hava livað saman sum hjún á felags bústaði 2 tey seinastu árini áðrenn deyðsfallið.
3. lívsarvingum, annars.
**Frágreiðing:** Lívsarvingar eru tíni børn, abbabørn og børnini hjá teimum.
4. sambært testamenti, og annars.
5. sambært arvalógini.

Ynskir tú, at tryggingarupphæddin skal útgjaldast til onnur ella skal býtast millum fleiri persónar, skalt tú senda eina njótunartilskilan til Alka. Sí partin: “Serligur njótanartilskilaður”. Tryggingarupphæddin verður útgoldin uttan um búgvið, soleiðis at møguligir kravánarar hjá tí, sum deyður er, ikki kunnu krevja at fáa lut í peninginum. Um eingir arvingar eru samsvarandi serligum ásetingum um njótanartryggjan, testamenti ella arvalógini,

verður eingin útgjalding at fara fram. Tryggingarupphæddin í samband við hættisliga sjúku, trygging hjá børnum verður útgoldin til limin sjálvan.

## Serlig njótunartilskilan

Ynskir tú at broyta mannagongdina við útgjalding til næstu avvarðandi, kanst tú fáa eitt skjal, sum viðvíkur serligari njótunarskilan. Tá hevur tú møguleika at seta einhvønn, tú ynskir, sum njótunarskilaðar í tryggingini. Ynskir tú t.d. at sambúgvi tín skal hava útgjaldingina, hóast viðkomandi ikki lýkur treytirnar um útgjalding sambært næstu avvarðandi, skalt tú senda eina njótunartilskilan til Alka.

Vart skal tó gerast við, at sjálvt um tú hevur sett ein serstakan njótunartilskilara, og um tú letur hjúnafelaga og/ella lívsarvingar eftir teg (børn, barnabørn og teirra børn), kunnu hesi mótmæla ásetingini um njótanartilskilan. Hetta merkir, at útgjaldið til tann njótunartilskilaða verður lækkað. Um tú ynskir at broyta eina áður innsenda njótunartilskilan við rætti at broyta hesa, skalt tú senda nýggja njótunartilskilan inn til Alka.

## Fráboðan og útgjald

Áheitan um útgjald av tryggingarupphæddum skal skjótast gjørligt latast felagnum.

Eitt oyðublað skal fyllast út, har tað stendur, hvørji skjalprógv skulu sendast saman við. Felagið sendir oyðublaðið til Alka. Tryggingarupphæddin verður sum meginregla goldin um felagið.

## Skattaviðurskifti

Tryggingargjald til tryggingina kann ikki dragast frá í skatti. Eitt útgjald frá tryggingini er frítikið fyri inntøkuskatt og avgjald til tað almenna. Av útgjøldum við deyða skal møguliga gjaldast arvaavgjald sambært føroyska lóg um hetta.

## Kærumøguleikar:

Við ósemju um tryggingina ella fráboðaðum skaða, kann kærast til:
Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2
1571 København V.
Telefon 0045 33 15 89 00
– millum kl. 10.00 og 13.00.

Við kæru skal serstakt oyðublað fyllast út, og hetta fæst hjá Ankenævnet, Alka, Forbrugerrådet, Forsikringsoplysningen ella Havnar Handverkarafelag.

## Alment

Krav um útgjald í sambandi við ávísar hættisligar sjúkur, barnatrygging og lokaupphædd fellur burtur, um hetta ikki er fráboðað Alka áðrenn deyða, ella 6 mánaðir eftir at tú ert farin úr felagnum, ella í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at avtalan millum felagið og Alka møguliga er hildin uppat.

Henda kunning er galdandi frá 1. januar 2011 og er eitt brot av felagslívstryggingaravtaluni og tryggingartreytunum. Nágreiniligu treytirnar eru tær til eina og hvørja tíð galdandi avtalur og tryggingartreytirnar.



# Vinnugrundstykki á Skarðshjalla til sølu

**Nú hevur tú møguleikan at ogna tær byggibúgvi vinnugrundstykki á Skarðshjalla.**

Sum framhald av útstykkingini á Sandvíkarhjalla, útstykkjar kommunan umleið 15.800 fermetrar til vinnugrundstykki á Skarðshjalla.

Grundstykkini eru ætlað til framleiðsluvinnu, byggivinnu, bilasølu, verkstaðir og líknandi vinnur, sum eru umhvørvisflokkaðar í flokki 3 til 6.

**Stødd av grundstykkjum**

Støddin á grundstykkjunum verður millum 800 og 1.800 fermetrar.

Grundstykkini verða útgrivin og grovplanerað, og verður fjarðhiti, vatn, kloakk og el lagt inná hvørt stykkið.

**Kostnaður**

Mettur fermeturprísur er. kr. 1.250,00

Helvtin av metta kostnaðinum, fellur til gjaldingar við undirritan av fyribilsskeyti, og restin fellur til gjaldingar, tá ið økið er liðugt byggibúgvið og grundstykkini eru matrikulerað.

**Tíðarætlan**

Fyrstu stykkini verða ætlandi byggibúgvin á heysti 2011.

**Fleiri upplýsingar**

Um tit vilja ogna tykkum eitt stykki, ella um tit hava spurningar í hesum sambandi, kunnu tit venda tykkum til løgdeildina á telefon 302010 ella senda okkum teldubræv á torshavn-@torshavn.fo

Tað skal viðmerkjast, at nøkur av stykkjunum eru avløgd.

Sí annars meira á torshavn.fo.

---

www.torshavn.fo

aquatherm BAXI ROYAL SCANDINAVIAN VØLUND VARMETEKNIK magn-line



## Nýtt orku-konsept frá Demich og Magn:

**Allar orkuloysnir til sethús og virkir á einum staði**

Les meira um nýggja orku-konseptið og Magnline oljuketilin á demich.fo/orkuhus

**SALTANGARÁ**
Heiðavegur 80
Tel. 200 380

**TÓRSHAVN**
Stiðjagøta 2
Tel. 200 300

**VÁGUR**
Á Marknoyri
Tel. 560 370




HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ

# HVS-VEITARIN TIL VINNUNA

Okkara døgntænasta er at hitta á tel. 200 345

## Tí velja handverkarar Demich

- Vit veita bestu ráðgevingina
- Vit eru landsdekkandi
- Vit umboða dygdarvørur
- Vit hava kappingarførar prísir
- Vit hava góða kundatænastu
- Vit hava døgntænastu
- Vit hava framkomnar blikksmiðjur

Á smiðjuni í Havn kunnu vit tilevna inndekningar upp til 3 m



www.grafikmaster.fo

demich
Hiti ▪ Ventilatión ▪ Sanitet

Okkara dygd – tín trygd!

www.demich.fo

Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo




BYGMA
BALSLEV










ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

# SKAPANDI ÚTBÚGVINGAR

www.tst.fo
skapandi umhvørvi

## Tekniski Skúlin

.... ein virkin og góður samstarvsfelagi

Ein skúli, ið gevur góða og samanhangandi undirvísing, í tøttum samstarvi við vinnu og lærling

- vit seta lærlingin í miðdepilin
- vit nøkta tørvin hjá vinnuni
- vit hava høgan námsfrøðiligan og fakligan førleika



Bil
Maskin
Smiðja
El
Timbur
Stíl@Snið

Tekniski Skúlin, Postrúm 3239, 110 Tórshavn, tlf. 738050, t-postur tst@skulin.fo, www.tst.fo

# Stásilig hølir til ymisk endamál





1. Hølini kunnu útleigast til limir, eins og onnur uttanfyri felagið; talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

2. Farast skal væl um hølini, og skulu tey latast aftur í sama standi, sum tá ið tey vóru útleigað.

Møguligir skaðar á innbúgv og útbúnað undir útleigan, skal alt fyri eitt fráboðast felagnum, og fult endurgjald fyri umvæling/nýkeyp skal rindast felagnum.

3. Hølini verða leiga út til hesi endamál:

A. Vanlig tiltøk og fundir eftir vanliga arbeiðstíð.  
B. Tiltøk, ið eru í vanligari arbeiðstíð og eftir vanliga arbeiðstíð.  
C. Tiltøk ið fevna um meira enn ein dag.  
D. Framsýningar, eftir nærri avtalu.  
E. Merkisdagar (t.d. føðingardag/fermingardag)  
F. Skeiðvirksemi.

4. **Prísir.**  
Er talan ikki um limir er kostnaðurin við køki pr. kvøld 2.000,- kr.  
Limir leiga hølini til Merkisdagar (inkl. nýtslu av køki) fyri 1.000,- kr.  
.  
Er talan um onnur tiltøk, sum t.d. fevna um fleiri dagar, verður nærri prísur avtalaður.



# Tímaløn, frítíðarløn, gjøld v.m.

**Tímalønin er frá 1. oktober 2010:**
**kr. 122,91 (minstaløn)**

3-ára starvsaldur gevur 1,6% lønarhækkan.
Frítíðarløn: 12%
Konto: 6460 - 299.601.6

**Limagjald og Lívstrygging:**
Limagjald + lívstrygging er 500,- kr. pr. mán. Limirnir gjalda sjálvir limagjald um ikki onnur avtala er gjørd við arbeiðsgevaran.
Konto: 9181 - 133.013.8
Konto: 6460 - 162.935.4

**Eftirløn:**
Arbeiðsgevarin: 13%
Løntakarin: 2%
Tilsamans: 15%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9
Vágs Handverkarafelag:
Konto 6460 - 516.417.8

**Sjúkragrunnurin BATI**
Løntakarin:
15 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Sjúkragrunnurin BATI
Postboks 3227, 110 Tórshavn.
Tlf. 229578 – fax: 319178. Teldupostur: hdg@post.olivant.fo
Konto: 6460-4951044
Konto: 9181-4955791

**Lærlingar:**
Lærlingar gjalda kr. 10,- pr. viku í limagjaldi.
Konto: 6460 - 401.200.5

Lærlingalønir (% av sveinalønini)
1. árið: 32%
2. árið: 40%
3. árið: 45%
4. árið: 55%

Eftirløn til lærlingar: 7,5%
Konto: 9181 - 132.833.8
Konto: 6460 - 152.555.9

**Eftirútbúgvingargrunnurin VITAN**
Arbeiðsgevarin:
10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Løntakarin:
10 oyru pr. tíma. (eftir skatt)
Umsiting: Vinnuhúsið
Postboks 1039, 110 Tórshavn.
tlf. 30 99 00 - fax: 30 99 01.
Teldupostur: mikkjal@industry.fo
Konto: 9181 - 495.879.0
Konto: 6460 - 101.278.0


Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir
Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir
PÓLAR
Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 60


Tú ert handverkarin!
... og vit hava eitt spennandi arbeiðspláss til tín
Vit kunnu bjóða
• spennandi arbeiðsuppgávur
• ein fjølbroyttan og áhugaverdan gerandisdag
• starvsfólkamenning
• trivnað
Hevur hetta tín áhuga, ring so til okkara ella send okkum eitt teldubræv
SENDISTOVAN
ELECTRIC
Hoyvíksvegur 53 100 Tórshavn Tel 351220 Fax 351230 lm@lm.fo www.lm.fo
LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering
· El-innleggingar · Ljós og talvur · EDV-& telefonnet · Neyðstreymsskipanir (no-break og diesel)
· Trygdarskipanir (ABA, ITV, AIA og ADK) · Hvítvøruservice
Døgntænastan svarar altíð á tel 35 12 20

# Glarmeistarin v/Poul Guttesen.



Søla og montering av
lágorkutermorútum ,
u-virði níður í 0,4 .
Einkultglas, spegl, herða glas
til brúsu–og glasveggir.
*www.glarmeistarin.fo*

Alt Glarmeistaraarbeiði verður gjørt. 219466-229466









PENSJÓN

# Áðrenn tú hevur vent tær, er framtíðin her

Tosa við okkum um tína pensjón í dag

**Skjótt skulu allir føroyingar gjalda til egna pensjón, og við tíðini fara minst 15 % av tíni løn til pensjón. Vit geva tær møguleika at velja millum fleiri sløg av pensjónum.**

**Vel millum:**

- **Kapitalpensjón** - tá fært tú pensjónina goldna út í einum
- **Lutapensjón** - tá fært tú pensjónina goldna út í lutum yvir í minsta lagi 10 ár
- **Lívrentu** – tá tryggjar tú tær eitt mánaðarligt útgjald, so leingi tú livir

**Set teg í samband við okkum í dag og tekna pensjón, tí áðrenn tú hevur vent tær, er framtíðin her.**

Vit samstarva fyri at veita
tær eina enn betri tænastu

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Eik

Betri pensjón